## Schumacher vil vinna

Nú sjeyfaldi Formel 1-vinnarin, Michael Schumacher, vendir aftur til kappkoyringina, er tað ikki bara til stuttleikar. Schumacher gavst at koyra Formel 1 í 2006, men hevur nú skrivað undir sáttmála við Mercedes við tí fyri eyga, at hann skal gerast heimsmeistari aftur. Tó tekur hann ikki sum givið, at tað fer at eydnast hetta fyrsta kappingarárið, men hann sigur seg hava góða tíð, tí sáttmálin er galdandi fram til 2013. Tilsamans hevur týskarin vunnið 91 Grand Prix-sigrar, og hann var heimsmeistari fyri síðstu ferð í 2004.



## Spurs-venjari skattasvíkur

Bretski ríkisákærin hevur ákært venjaran hjá Tottenham Hotspur, Harry Redknapp, fyri at hava svikað við skatti, tá hann var venjari í Portsmouth. Tvær ferðir skal hann hava sloppið sær undan at goldið skatt, tí hann fekk pengarnar fluttar á eina konto í Monaco. Tilsamans heldur bretska skattavaldið, at Redknapp hevur fingið yvir hálvaaðru millión krónur uttan um skipanina, og nú er hann stevndur fyri rættin at greiða frá sínum skattaviðurskiftum.

# Goodison Park feldi Mancini

**Manchester City tapti greitt á einum væl uppløgdum Everton-liði, sum fekk dyggan stuðul frá einum kókandi Goodison Park. Hetta var fyrsta tapið hjá Mancini, sum í dystinum skifti dýrasta keypið í Onglandi nakrantíð – inn og út!**




Tróndur Arge

Tað luktar av steiktum pylsum og burgarum, eitt betongverk klætt lýsingum, og fert tú inn í skeivu hurðina, endar tú í kjallaranum hjá onkrum scousara… Vælkomin til Goodison Park við Sosialinum!

Goodison Park er heimavøllurin hjá Everton, sum hevur heimstað í býnum Liverpool. Eins og Anfield, so liggur Goodison mitt í einum búðstaðarøki. Tú skalt bara yvir um vegin, so kanst tú banka uppá hjá onkrum av teimum lokalu, sum bera eyknevnið "scouser."

Everton hevur ætlanir um at byggja ein nýmótans leikvøll, men so seint sum í jólamánaðinum fingið teir reytt ljós frá kommunini. Ein annar møguleiki er at byggja ein leikvøll saman við grannunum úr Liverpool FC. Har hevur komunan játtað at stuðla, men tað dámar einki viðhaldsfólkinum.

Á veg til dystin sigur hýruvognsførarin, sum er Everton-viðhaldsmaður, at hann hevði ikki havt nakað ímóti at deilt ein leikvøll við grannarnar, um tað hevur ein stóran fíggjarligan vinning fyri Everton. Av teimum, sum Sosialurin tosaði við, var hann tann einasti, ið helt at tað var eitt gott hugskot. Hini tosaðu ikki pent um grannarnar, men brúktu orð sum »Fat chance« og »Never ever gonna happen«.

At onnur eisini hava fingið við, at nýggjur leikvøllur er eitt sindur av einum stríðsmáli í Liverpool, prógvaðu viðhaldsfólkini hjá Manchester City, tá tey sungu: »CHANG reads: Can't Have A New Ground«. CHANG er høvðusstuðulin hjá Everton…

### Sera stutt fráströða

Ein av fyrimuninum við teimum »gomlu« leikvøllunum er stemningurin. Áskoðarnir eru kroystir saman og tað er stutt frá síðulinjuni til áskoðararnar. Tað fekk fyrrverandi Manchester United-spælarin, Phil Neville, at kenna í seinna halvleiki. Hann spældi á høgra bakki og fram við síðulinjuni, og har sótu allir City-áskoðararnir.

Teir góvu ilt av sær, hvørja ferð Neville var í hornatøkum ella skuldi kasta innkast í tí økinum. Hinvegin so vóru Everton áskoðarnir eisini skjótir at stuðla Neville tá hann kom í óføri.

Ein afturgangandi vansi við teimum gomlu leikvøllunum er beinplássið. Tað ber næstan ikki til at seta seg niður, so stutt er fram til setrið frammanfyri. Eisini hevur Goodison fleiri stórar stálbjálkar, sum taka ein part av útsýninum. Tað var næstan sum at sita í »bygdaskýlinum« í Gundadali.

### Fellaini gekk undan

Eitt, sum vanligi viðhaldsmaðurin í Onglandi setur stóran prís á er »fight«. Ein spælari, sum kempar og kastar seg í hvønn nærdyst, vinnur skjótt virðing. Tað var júst tað, ið 22 ára gamli Marouane Fellaini hjá Everton gjørdi. Hann er stórur av vøkstri og hevur stórt eykent »afrohár«. Belgiski landsliðsspælarin tók ræðið á miðvøllinum beinanvegin, og fleiri ferðir vísti hann sína dygdir í luftspælinum.

Tað vóru serliga tvær støður, har Fellaini fekk Goodison at reisa seg, og í báðum førum var tað Craig Bellamy, sum tað gekk útyvir. Fyrst streyk Bellamy avstað frá tveimum Everton-spælarum heilt úti í vinstru síðu, men sum eitt tanks kom Fellaini trumlandi út ímóti síðulinjuni og kastaði seg niður í eina glíðandi takling og vann bóltin.



Robinho, ið bæði var skiftur inn og út á liðnum hjá Manchester City leygardagin, dystast her við Tim Cahill hjá Everton

Mynd: Polfoto

Seint í seinna hálvleiki setti Fellaini aftur sín dám á dystin, tá hann fangaði bóltin frá Bellamy. Í besta Zidane-stíli trakkaði hann á bóltin og mól rundan um seg sjálvan og Bellamy – til stóra gleði fyri Goodison.

### Robinho inn og út

Eins og angurin av steiktum pylsum hoyrir við til at fara til fótbóltsdyst í Onglandi, so er háðan av mótstøðuni eisini ein partur av spælinum. Tað slap Robinho at hoyra fyri. Fyrst bleiv hann skiftur inn tíðliga í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki valdi Mancini at skifta hann útaftur. Tað var til stóra gleði fyri áskoðararnar hjá Everton, sum allir reistust og veittraðu til Robinho, meðan hann skuffaður gekk av vøllinum.

Robinho er upp á nógvar mátar ímyndin av nýggja Manchester City. Hann var fyrsta keypið, eftir at Sheik Mansour kom til felagið, og hann er framvegis dýrasta keypið í Onglandi. Meðan Manchester City støðugt hevur ment seg, so peikar pílurin øvugtan veg hjá fyrrverandi Real Madrid-spælaranum.

Dysturin endaði annars við, at Everton vann uppiborið 2-0. Steven Pienaar og Louis Saha skutu málini. Manchester City tapti fyri fyrstu ferð við Roberto Mancini sum venjara. Og so kundu viðhaldsfólkini hjá Everton syngja fyri gestunum: »What the score Lescott…«

## FAKTA

**Premier League, úrslit**

| | |
|---|---|
| Bolton-Arsenal | 0-2 |
| Blackburn-Fulham | 2-0 |
| Aston Villa-West Ham | 0-0 |
| Everton-Manchester City | 2-0 |
| Tottenham-Hull | 0-0 |
| Wolverhampton-Wigan | 0-2 |
| Man. United-Burnley | 3-0 |
| Chelsea-Sunderland | 7-2 |
| Stoke-Liverpool | 1-1 |